## Næmingar fella frá

Royndirnar hjá dønum at útbúgva yvirmenn, sum bæði kunnu vera á brúnni og í maskinrúminum, hava ikki roynst serliga væl. Aðalskrivarin í yvirmannafelagnum, Fritz Ganzhorn, sigur við Ritzau, at millum 50 og 60 prosent av næmingunum klára ikki royndirnar. Hetta kann ikki halda fram, og tí má útbúgvingin endurskoðast, heldur hann. Tað er sjómansskúlin í Svendborg, sum stendur fyri teirri tvíbýttu útbúgvingini.

## Eimskip nýtt skip

Leygardagin yvirtók Eimskip eitt nýtt farmaskip, sum er bygt á norsku skipasmiðjuni Vaagland Båtbyggeri. Skipið hevur fingið navnið "Storfoss", og tað skal sigla ímillum Noreg, Bretland og Niðurlond. "Storfoss" er 80 metrar langt, 16 metrar breitt, og tað er merkt 2.990 tons. Frystilastin er góðar 4.300 rúmmetrar, og harafturat er pláss fyri 32 bingjum. Mesta ferð er 16 míl. Skipið er ikki skrásett í Íslandi, men á oynni Antigua.



*Mynd: Harald M. Valderhaug*

# Ferðirnar geva samanhald

**Fiskavirkið Tavan arbeiðir í tveimum vaktum seks dagar um vikuna alt summarið. Av tí at starvsfólkið ikki hevur møguleika at uppliva summarið í Føroyum, hava tey fleiri ferðir verið uttanlands og ferðast**

TRIVNAÐUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*



*Joen Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni*

Tavan í Leirvík er eitt av teimum fiskavirkjum, sum arbeiðir sera nógv. Tey arbeiða so gott sum altíð í tveimum vaktum.

- Vit royna at skapa so góðar karmar sum møguligt. Vit hava eina hugnaliga kantinu, og vit hava prýtt veggirnar í bæði kantinuni og í gongini við málningum, sigur Joen Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni.

Í umleið 3 ár hevur Tavan haft ein massør tilknýttan virkinum. Starvsfólkini hava møguleika at fáa massasju í arbeiðstíðini.

- Starvsfólkini eru øðiliga glað fyri møguleikan, og fleiri siga okkum, hvussu væl tað hjálpir, sigur Joen Magnus Rasmussen og heldur fram:

- Vit rokna eisini við, at spara fleiri sjúkudagar á tann hátt.

### Uppliva summarið

- Av tí at vit arbeiða seks dagar um vikuna alt summartíðarskeiðið, sleppa starvsfólk okkara ikki at njóta summarið í Føroyum. Av tí sama eru vit nøkur ár farin uttanlands at ferðast við starvsfólkinum, sigur Joen Magnus Rasmussen.

Eitt árið hava tey verið í Danmark, eina aðru ferð hava tey verið í Prag og í ár vóru tey í Eysturríki.

- Største orsøkin til, at vit fara hesar túrarnar, er, at starvsfólkið ikki upplivir summarið í Føroyum. Men tað er eisini fyri at samansjóða fólkið, greiðir Joen Magnus frá.

- Vit hava tilvitað valt at fara busstúrar, har vit øll eru nógv saman. Á tann hátt koma vit at kenna hvønn annan á ein heilt annan máta. Vit hava avgjørt merkt, at samanhaldið er vorðið betri, tí man lærir hvønn annan nógv betur at kenna.

- Tað vit vóna at uppnáa, er at fólkið verður verandi longri. Eg haldi avgjørt eisini at nøgd arbeiðsfólk geva meir.



*Í 2005 vóru starvsfólk úr Tavuni í Prag og ferðaðust. Her hava tey ein matarsteðg í Dresden í Týsklandi á veg til Prag.*

# Fólk, ið eru væl fyri, framleiða meira

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjøgnumført fleiri tiltøk, til frama fyri trivnaðin og vælveruna hjá starvsfólkinum. Tankin aftanfyri er, at tá starvsfólkini hava tað betur, ávirkar tað felagið og fremur produktivitetin**

TRIVNAÐUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Edvard Heen, varastjóri, og Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar*

- Trivnaður kann bítast upp í fleiri ting. Eitt eru teir fysisku karmarnir, til dømis hús, skrivstovuamboð og borð, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

- Síðan er tað hvussu starvsfólkini hava tað fysiskt, um tey eru væl fyri og frísk. Tað triðja er tann psykiska vælferðin, hvussu tey trívast í arbeiðinum, og um tey hava somu málini og virðini, sum felagið hevur. Og síðst men ikki minst, at man fær spennandi uppgávur at arbeiða við.

### Starvsfólkakanning

Fyri góðum ári síðan, gjørdi Tryggingarfelagið Føroyar eina kanning, sum 101 av teimum 115 starvsfólkunum svaraðu uppá. Kanningin vísti hvussu heilsustøðan og trivnaðurin vóru.

Úrslitið vísti nakrar tendensir, sum leiðslan í felagnum valdi at gera nakað við, bæði á fysisku og psykisku síðuni.

- Kanningin, vísti millum annað, at rættiliga nógv av starvsfólkunum høvdu ilt í høvdinum og migrenu. Vit avgjørdu, at vit skuldu gera nakað við tað, greiðir Gunnar í Liða frá.

-Vitinnførduergonomiskt røtt skrivstovuamboð, til dømis borð, sum kunnu lyftast upp og lækkast, sigur Edvard Heen, varastjóri og leggur afturat:

- Í heyst hava vit fingið ein kiropraktor, sum kemur á arbeiðsplássið einaferð um vikuna, so kunnu starvsfólkini, sum hava trupulleikar við rygginum, fáa viðgerð.

Sum fyribyrging hevur Tryggingin haft eitt skeið, har starvsfólkini lærdu at avspenna í høvdi, nakka og akslum.




*Tryggingarfelagið Føroyar bjóðar sínum starvsfólki viðgerð hjá kiropraktor, fyri ryggpínu og høvuðpínu. Tey hava innrættað eitt rúm til endamálið.*

### Fitness og royki avvenjing

Forstjórin og varastjórin vísa til ymiskar útlendskar kanningar, sum vísa nakrar tendensir.

- Fyri tað fyrsta, um tú ikki ert væl fyri fysiskt, so framleiðir tú minni. Roykir tú, so ert tú meira frá og hevur fleiri sjúkudagar. Og hevur tú ikki rættan arbeiðsstøðu, so fært tú nógvar sjúkudagar orsaka av høvuðpínu og ryggpínu, sigur Gunnar í Liða.

Fyri at starvsfólkini á Tryggingini skuldu koma í betri form, hevur felagið givið stuðul til limakort í fitness sentri.

Eisini hava tey gjørt nakað við roykiforholdini. Frá 1. januar verður ikki longur loyvt at roykja innandura. Í hesum sambandi hava tey bjóða teimum starvsfólkum ið roykja og ynskja at leggja av, eitt avvenjingar skeið.

### Positiv ringrás

- Vit vóna, at vit fáa eitt hækkandi heilsustøði. Tá starvsfólkini fáa tað betri, fær stovnurin eisini nakað burturúr. Tað sæst aftur í produktivitetinum. Økt vælferð skapar trivnað, øktur trivnaður skapar eina positiva ringrás, sum ávirkar alt í felagnum, sigur Gunnar í Liða.

Alt hetta hevur ávirkan á fysisku vælveruna, men fyri eisini at fokusera uppá tað psykiska fara tey at gera starvsfólkasamrøður, sum skulu vera á hvørjum ári. Har fáa øll starvsfólk eina samrøðu við tann nærmasta leiðaran. Evni sum ynski um karrieru ella útbúgving, rís og rós vera tosaði um á hesum fundum.

- Hesar samrøður skulu vera við til at skapa eina felags uppfatan og vera ein útviklingur av hvørjum starvsfólki, tí tað er týdningarmikið, at virðini hjá tí einkulta eru í tráð við virðini hjá felagnum, sigur Gunnar í Liða.